# ARBEIÐIÐ Á SALM PRO LIGGUR STILT



**STEÐGUR – Hetta er fimmta vikan, síðan framleiðslan av portiónum helt uppat, og vit bíða framvegis eftir, at gongd fer at koma á aftur, siga fólk, sum arbeiddu á laksavirkinum Salm Pro í Fuglafirði**

Vilmund Jacobsen

Laksavirkið Salm Pro í Fuglafirði, sum læt upp av nýggjum miðskeiðis í summar, hevur nú staðið stongt síðan miðskeiðis í oktober.

Sum skilst, arbeiðir leiðslan í felagnum við at finna ein langtíðar marknað til laksaportiónir.

Faroe Seafood syrgdi fyri søluni av framleiðsluni hjá felagnum í Fuglafirði til fyri stuttum, men síðan órógv kom í hjá Faroe Seafood, og Eik Banki samstundis fór av knóranum, hevur verið neyðugt hjá Salm Pro at leita sær nýggjar keyparar til sínar portiónir.

– Hetta er fimmta vikan, síðan framleiðslan á virkinum helt uppat, siga arbeiðsfólk, sum Sosialurin hevur tosað við.

Tey siga, at enn vita tey ikki, nær framleiðslan kemur í gongd aftur, men tey ivast onga løtu í, at virksemið kemur upp at koyra aftur, áðrenn langt um líður.

– Nú framleiðslan hevur ligið still hesar vikurnar, hava vit gjørt ymiskar ábøtur og viðlíkahald, siga fólk, sum hava tilknýti til Salm Pro í Fuglafirði.

### 40 arbeiðspláss

Tað var Faroe Seafood, sum upprunaliga átti og rak laksavirkið í Fuglafirði, men áðrenn virksemið byrjaði aftur miðskeiðis í summar, hevði Faroe Seafood selt 2/3 av felagnum til ávikavist Viking Seafood á Strondum og Faroe Farming í Suðuroy.

Eigarviðurskiftini í Salm Pro eru soleiðis tríbýtt, har nevndu trý feløg eiga ein triðing í part.

– Málið er at virka 3.000 tons av laksi til portiónir um árið, og hetta fer ætlandi at geva arbeiði til út við 40 fólk, tá framleiðslan veruliga er komin í gongd, segði Jákup Eli Thomsen, virkisleiðari, tá Sosialurin skifti orð við hann í summar.

Hann legði aftrat, at meginparturin av laksinum, sum tey fara at virka til portiónir í Fuglafiði, fer at koma frá kryvjivirkinum Viking Seafood á Strondum.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Orkudepil fingið sáttmála um

**SÁTTMÁLI - Nú sáttmáli er undirskrivaður við miðnámsskúlan á Kambsdali, verður arbeitt við líknandi sáttmála við elfelagið SEV, men hetta er treytað av gókenning frá elveitingareftirlitinum, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu**

Vilmund Jacobsen

Orkudepilin á Kambsdali hevur nú undirskrivað sáttmála um íbinding í verandi hitaskipan hjá miðnámsskúlanum á Kambsdali.

Sáttmálin varð undirskrivaður hin 25. oktober í ár.

Tað er Landsverk, ið sum kunnugt er umsitari av bygningunum hjá tí almenna.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, sigur, at tað í fyrstu syfti verður sólorkan frá teimum 350 fermetra stóru sólfangarunum, ið geva umleið 1,2 megawatt um árið, sum verður latin inn á miðnámsskúlan á Kambsdali.

> **... verkætlanin á Kambsdali kann verða við til, at vit ikki vera eftirbátar at minka um útlátið av veðurlagsgassum...**
> SIGURD SIMONSEN

– Væntandi verður skipanin virkin um nakrar fáar vikur, leggur hann aftrat.

Borgarstjórin sigur, at viðvíkjandi vindmyllu- og vetnisskipanini hjá Orkudeplinum verður arbeitt við líknandi sáttmála við elfelagið SEV, men hetta er treytað av gókenning frá elveitingareftirlitinum.

– Í hesum førinum verður tað so vindmylluorkan frá teimum báðum myllunum, ið eru settar upp og møguliga einari aftrat, ið umvegis vetnisskipanina verður leitt inn á netið hjá SEV.

### Langt á mál

Sigurd Simonsen sigur, at við hesum er tann mekaniski og tekniski parturin av Orkudeplinum á Kambsdali komin undir land.

– Eftir stendur so depilshúsið, ið skal hýsa stýringum og alskins mátitólum umframt umstøðum til at granska og menna tøknina og harvið náa málinum um ein granskingar- og vitanardepil innan varandi orku.

Borgarstjórin sigur, at verkætlanin við Orkudeplinum á Kambsdali kann verða við til, at vit føroyingar ikki vera eftirbátar í strembanini eftir at minka um útlátið av veðurlagsgassum.

*vilmund@sosialurin.fow*



*– Í fyrstu syfti verður tað sólorkan frá teimum 350 fermetrar stóru sólfangarunum, sum verður latin inn á miðnámsskúlan á Kambsdali, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu*